FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

19. november 2024
Mál: 24/25439-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-050/2024

**Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-050/2024 frá Grími Sundstein, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fiskivinnu- og samferðslumálum, Dennis Holm, um tunnil til Vestmanna**

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Nær verður væntandi farið undir at bora tunnil til Vestmanna ?

2. Hevur landsstýrismaðurin saman við landsstýrinum gjørt nakra endaliga raðfesting av, hvørjir tunlar skulu gerast næst ?

3. Fer arbeiðið at fyrireika og prosjektera tunnil til Vestmanna at halda fram komandi árini, hóast ongir pengar eru játtaðir á fíggjarlógini til Vestmannatunnilin fyri 2025 og frameftir ?

**Svar til spurning 1**

Farleiðin til Vestmanna er sum heild góð, men tað kann vera trupult at koyra á vetri fyri hálku og vindi, serliga á Høgareyni. Umstøðurnar eru tó ikki øðrvísi enn á øðrum fjallavegum kring landið.

Landsverk røkir vetrarhaldið væl. Vegirnir verða saltaðir regluliga, og kavi verður grivin nakrar dagar um árið. Av og á verður rátt frá at koyra vegna veður. Tað kemur fyri, at Vestmannavegurin verður stongdur, eins og aðrir fjallavegir.

Landsstýrið hevur ikki tikið endaliga støðu til, hvørt ein tunnil skal gerast til Vestmanna. Tó hevur játtan verið sett av til at kanna, hvørjar loysnir kundu verið.

Í høvuðsheitum hevur verið arbeitt við tveimum ymiskum tunnilsloysnum, har onnur loysnin er ein tunnil úr Kvívík til Vestmanna, sum er 4,2 kilometrar langur. Hin loysnin er ein tunnil úr Leynum til Vestmanna, sum er 6,2 kilometrar langur. Jarðfrøðiligar kanningar eru gjørdar í hesum sambandi.

Ministry of Fisheries and Infrastructure

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

Landsverk hevur samskift við Kvívíkar kommunu og Vestmanna kommunu um linjuføringarnar, og nakrar tillagingar verða gjørdar.

Ein tunnil millum Kvívík og Vestmanna verður mettur til at kosta umleið 650 mió. kr. við 40% váðaískoyti. Ein tunnil millum Leynar og Vestmanna verður mettur til at kosta umleið 950 mió. kr., við einum váðaískoyti uppá 40%.

**Svar til spurning 2**

Viðvíkjandi íløguætlanini verður árligi játtanarkarmurin 600 mió. kr. næstu árini, og tí hevur verið neyðugt at raðfest. Innan íløgur í til dømis alla vegagerð (vegir, tunlar og brýr), sum Landsverk fyrisitur, lækka játtanirnar frá 329 mió. kr. í 2024, til 73,6 mió. kr. í 2025 eftir fíggjarlógaruppskotinum. Síðani verður játtanin til vegagerð 61,4 mió. kr. í 2026 og 80,4 mió. kr. í 2027.

Íløguætlanin verður dagførd javnan, og tí ber ikki til at tosa um nakra endaliga raðfesting innan tunnilsgerð. Neyðugt er við breiðum, politiskum semjum um, hvørjar íløgur skulu gerast í infrakervið komandi árini.

**Svar til spurning 3**

Sum tilskilað í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2025 er skotið upp at fara undir at gera Vestmannatunnilin, tá Tjørnuvíkartunnilin er liðugur. Tá eigur Vestmannatunnilin at vera liðugt fyrireikaður og prosjekteraður.

**Dennis Holm**
landsstýrismaður